


*Ingun Simonsen sæst her við avbera flottu myndini, ið tryggjaði henni bæði steyp og medalju í eini altjóða fotokapping á netinum. – Eg var ótrúliga yvirraskað, tá hetta kom sendandi við postinum, tí eg var farin at halda, at kappingin bert var tað reina fupp, sigur hon*

*Mynd Jens Kristian Vang*

Ingun Simonsen úr Havn:

# Fekk prís í altjóða fotokapping

**Tá Ingun Simonsen úr Havn fór eftir postinum mánamorgunin, fekk hon eitt stórt yvirraskilsi. Við í postinum var nevniliga eitt steyp og ein medalja, sum hon hevði vunnið sær í eini fotokapping á internetinum. – Eg ivaðist ikki í, at kappingin var tað reina fupp, so hetta var veruliga eitt yvirraskilsi, sigur hon**

FOTOKAPPING
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

– Tað var ein altjóða kapping, sum eg av tilvild sá á netinum. Eg prøvaði bara at senda eina mynd, mest til stuttleika, og eg fekk beinanvegin svar, at tey høvdu móttikið mína mynd, greiðir Ingun Simonsen frá.

Kappingin var býtt upp í ymiskar bólkar, og myndin, sum Ingun sendi, skuldi luttaka í kappingini um bestu náttúrumynd.

Hetta var í apríl mánaða, men sum tíðin gekk, bleiv Ingun meiri og meiri sannførd um, at kappingin ikki var ein verulig kapping.

– Satt at siga, so helt eg, at tað var tað reina fupp. Hóast eg allatíðina hoyrdi frá teimum um t-postin, so trúði eg ikki rættiliga uppá tað, greiðir Ingun frá.

## Finalistur

Ingun sigur, at tá ein tíð var farin, fekk hon ein mail, sum lat hana vita, at hennara mynd var vald út til finaluna. Men skuldi hon hava nakran møguleika at vinna, mátti hon koma yvir til Washington. Bert tey, ið frammanundan boðaðu frá, at tey komu við til avdúkingina av vinnaranum í Washington, høvdu ein møguleika at vinna kappingina.

– Tey bjóðaðu mær yvir til Washington at vera við, tá ið vinnarin varð avdúkaður. Eg haldi, at tað skuldi vera eitt stórt show, sum skuldi vara í tríggjar dagar. Millum annað skuldu myndirnar vísast fyri professionellum fotografum, fortelur Ingun.

Tey gjørdu henni greitt, at um hon ikki kom til Washington, so var myndin tikin burturúr, og so hevði hon ongan møguleika at vinna.

– Eg skuldi sjálv gjalda ferðina, og tey skuldu so gjalda fyri uppihaldið í Washington, sigur Ingun.

– Tað var ein sera stór altjóða kapping, við nógvum luttakarum úr øllum heiminum. Finalistar vórðu funnir í øllum hesum ymisku myndabólkunum, og ein vinnari skuldi so finnast eisini. Tað hevði verið spennandi at verið har, men eg tók ikki av, tí eg var sannførd um, at tað var fupp, tað heila, greiðir Ingun frá, og viðgongur, at hon í dag iðrar seg um, at hon ikki tók av tilboðnum um at fara til Washington.

Tað kundi jú verið stuttligt at vita, hvussu langt myndin kundi komið. Men tað gerst so ikki við nú.

## Altíð tikið myndir

Ingun sigur, at henni altíð hevur dámt ótrúliga væl at taka myndir.

– Eg havi altíð tikið nógvar myndir, og tann, eg sendi inn, var ein sera flott mynd, haldi eg sjálv. Hon er tikin vesturi í Vágunum, og er av einum sólsetri. Tað er so sjáldan, at tað ber til at fáa avmyndað himmalin soleiðis, sum hann sær út í veruleikanum, men tað eydnaðist á hesin myndini, greiðir Ingun frá.

Hon sigur, at tað var so óalmindiliga vakurt hetta kvøldið. Sólsetur og bláur himmal, og hon tók nógvar myndir av flottu náttúruni. À teimum flestu gjørdust himmalin appelsingulur, men á hesu einu myndini eydnaðist tað at fáa himmalin soleiðis, sum hann veruliga sá út, sigur Ingun.

Hon sigur víðari, at hóast hon altíð hevur havt stóran áhuga fyri myndatøku, so hevur hon ikki verið við í nógvum myndakappingum.

– Eg sendi inn til SMS-kappingina, men har vóru so nógvar flottar myndir, at har hevði eg ongan møguleika at vinna, staðfestir hon.

Hon var tí ógvuliga yvirraskað, tá hon nú brádliga fekk steyp og medalju sendandi við postinum.

– Sum sagt, so hevði eg langt síðani avskrivað hesa kappingina, og tí eri eg enn fullkomiliga yvirraskað, tá tað nú vísti seg at passa, hóast alt, sigur Ingun at enda.

Myndin hjá Ingun Simonsen kemur í eina bók, har allar hinar finalistmyndirnar í kappingini eisini vera við.




Skeið innan trivna og umhvørvi á arbeiðsplássinum

Serfrøðingar frá CRECEA (fyrr v. BST) vóru í Føroyum í juni og hildu seminar innan fleiri av hesum skeiðum, ið vit fara at bjóða nú í novembur. Nógv fólk nýttu høvið at hoyra teir, og eftirmetingarnar vóru ógvuliga góðar.

Psykiskt arbeiðsumhvørvi og organisatiónsmenning

Endamál:
At luttakarir ogna sær vitan um samanhangin millum organisatión, strategi og psykiska arbeiðsumhvørvið í fyritøkuni.
Luttakarin fær:
Kunnskap um organisatoriska viðurskiftini og psykiska arbeiðsumhvørvið
Vitan um samanhang millum organisering av arbeiði, trivnaði og produktiviteti
Royndir við "case forløbum", har kjakast verður um organisatión og trupulleikar við psykiska arbeiðsumhvørvinum, og møguleikar verða roynd ir
Hjálp til design av m.a. samskifti, leiðaraleikluti, mannagongdum, leiðaramennan, team-mennan og psykiska arbeiðsumhvørvinum í fyritøkuni

Málbólkur:
Skeiðið vendir sær til leiðarar og millum leiðarar

Innihald:
Á hesum skeiðnum fær luttakarin hjálp til at skapa klárari ramm ur og mál fyri tein psykologisku mannagongdunum, ið eru bundnar at menningini av umsitingini. Luttakarin fær harafturat møguleika fyri at fáa egnu viðir innan strategi, umsiting, leiðslu og psykiska arbeiðsumhvørvið at samsvara.
Undirvísingin skiftir millum fyrilestur, bólkavenjingar og royndir við teori í sokallaðum "case-forløbum".

Dagar: 10. og 11. nov, kl. 09:00-16:00



Onnur skeið innan trivna og arbeiðsumhvørvi:

Sjúkrafrávera - spill av góðum kreftum
8. og 9. nov, kl. 09:00 - 16:00
At skilja og loysa konfliktir
9. nov, kl. 09:00 - 16:00
Tema dagur: Heilsubetran á arbeiðsplássinum
10. nov, kl. 09:00 - 16:00
Ergonomiskt og psykiskt arbeiðsumhvørvi
11. og 12. nov, kl. 09:00 - 16:00

Skeiðlýsingar fyri hesi skeið eru at finna á heimasíðu okkara á www.kvasir.fo.
Vit veita eisini serligt tilboð til stovnar og fyritøkur. Tit eru vælkomin at seta tykkum í samband við okkum um hetta. Vit bjóða okkum eisini til at koma út til tykkara at greiða meira áf hesum skeiðum.

KVASIR
Tel 320 204 - www.kvasir.fo - kvasir@farodane.fo



